

Alistair Carmichael, bretskur ráðharri fyri Skotland, leggur krans á grøvina hjá bretskum hermonnum í krígskirkjugarðinum í Miðvági. Mynd Jan Müller/oljan.fo

# Bretskur ráðharri legði krans á bretsku gravirnar í Vágum

**Jan Müller**

14.03.2015 - 22:22

Oljan.fo

Í sambandi við vitjanina hjá bretska ráðharranum fyri Skotland, Alistair Carmichael í Føroyum nú um dagarnar, varð eisini vitjað í bretska kirkjugarðinum í Miðvági, har fleiri bretskir hermenn eru jarðaðir. Har nýtti ráðharrin í allar besta sólskinsverðri at leggja ein krans á grøvina og minnast teir, ið fóru.

Við í ferðalagnum vóru eisini umboð fyri Vága kommunu og Krígssavnið.


At this location there are
Commonwealth
War Graves
www.cwgc.org








